## Norðoyastevnu-blaðið 2004

**Útgevari:**
Sosialurin
Argjavegur 26
Postsmoga 76
FO-110 Tórshavn
Tlf 341800 ella 341820
Fax 341801
Teldupostur:
post@sosialurin.fo

**Blaðstjórn:**
Solby A. Eliasen
solby@sosialurin.fo

**Lýsingar:**
Durita Simonsen
durita@sosialurin.fo
Solby A. Eliasen
solby@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Anna V. Ellingsgaard
anna@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein
eydun@sosialurin.fo
Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo
Jóannes Hansen
joannes@sosialurin.fo
Páll Holm Johannesen
pall@sosialurin.fo

**Myndir:**
Álvur Haraldsen
alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang
jensk@sosialurin.fo

**Umbróting:**
Hestprent

**Prent:**
Prentmiðstøðin

**Forsíðumynd:**
Álvur Haraldsen


*Endurgeving av tilfari úr hesum blaði er bert loyvd, um greitt verður víst til kelduna*

### Steinbjørn O. Jacobsen, borgarstjóri:

# Klaksvík nýggjar dyr og nýtt andlit

**Norðoyastevnan 2004 verður tann næst seinasta, har flestu gestirnir koma sjóvegis til Klaksvíkar. Nýggja tíðin er bæði ræðandi og spennandi í senn, men mest av øllum er fasta vegasambandið anno 2006 tann største avbjóðingin fyri okkara lokalsamfelag í nýggjari tíð – ja, kanska allarstørsta í lokalsøgu okkara**



Tíðin tykist at hava gingið skjótt, síðani tosið um Norðoyatunnilin av álvara tók dik á seg.

Samlaða tunnilslongdin, sum higartil er sprongd ígjøgnum, nærkast í skrivandi stund hálvumøðrum kilometri. Longu um eitt ár verða allir seks kilometrarnir skotnir ígjøgnum, og áðrenn Norðoyastevnuna 2006 verður koyrandi á Norðoyastevnu hjá flestu føroyingum.

Broytta ferðasambandið verður fyrst og fremt ein kollvelting fyri okkum hesumegin fjørðin.

Avbjóðing og stevnumið okkara er og verður harafturímóti at fyrireika okkum so væl til hetta nýggja sambandið, at árinið frá okkara lokaløkið – og tað, okkara lokaløkið hevur og fer at bjóða – skal fara at merkjast so langt sum tilber inn á meginøkið.

Jú, Klaksvik bjóðar enn einaferð framtíðini av.

Hetta siðvanda undangonguøkið, sum í mansaldrar hevur bygt upp sín egna sterka samleika, skal nú eftir fáum árum saðla um á fleiri økjum, tí í 2006 verða vit á ein heilt nýggjan og áður óroyndan hátt partur av meginlandinum í Føroyum.

Á nógvum lyklaplássum í lokalsamfelag okkara hava fólk brotið upp um armar. Onkustaðni er nýggj kós sett út í kortið inn á nýggjar spennandi leiðir. Ongar nýhugsanir koma av sær sjálvum – tær mugu skapast av menniskjum, sum vilja og evna at bróta upp úr nýggjum innan teirra yrki og áhuga.

Onkur hevur orðað seg nakað soleiðis, at fólk, sum ikki skara framúr, bara tosa um onnur fólk. Tey, ið eru eitt sindur yvir miðal, tosa um hendingar. Meðan tey, sum eru í fremstu røð, og sum skapa nakað í teirra samtíð, tosa um visiónir og framtíðarætlanir.

Sum so mangt annað her í verðini er hetta ein sannleiki við avmarkingum. Uppgávurnar hjá fólki eru jú so ymiskar, og vit eru væl øll ein samanseting av øllum teimum trimum nevndu fólkasløgunum. Men greitt er, at Klaksvík í dag, kanska meir enn nakrantíð, hevur tørv á og dúvar uppá virkisfýsni og dugnaskapin hjá okkara oddafólkum teimum ymisku økjunum.

## Kappingin harðnar

Vit ynskja at skapa trivnað fyri okkara borgarar og framburð til økið okkara: Tí liggja stórar ætlanir fyri framman, men kappingin er hørð, og fyri summar tættir í samfelagnum verður hon enn harðari undir nýggju umstøðunum á samferðsluøkinum.

Sum býráð kunnu vit í fleiri førum vera við til at ávirka partar av teimum málum, ið leika á – einamest við at skapa karmar og leggja lunnar fyri tí virksemi, sum er.

Tá tað er gjørt, vónandi nóg væl, situr politiska leiðslan spent og fylgir við, hvussu leikur fer á teimum ymisku økjunum.

Inniliga vón og ynski mítt sum borgarstjóri skal vera, at tær ætlanir um framtøk til frama fyri framburð Klaksvíkar skulu fáa blíðan byrð, og vil eg vegna býráðið ynskja øllum, sum virka við í hesum átøkum, alla eydnu við teirra virksemi.

## Verið vælkomin

Vetrarítróttin er av og royndist norðoyingum væl. Okkara fremstu ítróttarumboð vunnu okkum miklan heiður og fleiri gullheiðursmerki innan ymsar ítróttargreinir.

Nú summarið veruliga hevur tikið fastatøkur á náttúru okkara saman við vøkru blómunum og syngjandi fuglunum er eisini summarítrótturin við at ota seg upp á hæddina, og á Norðoyastevnu verður so fyrsta skotið til FM-kappróðurin latið av.

Til eina rúgvusmikla og fjølbroytta norðoyastevnuskrá ynski eg vegna Klaksvíkar bý at bjóða norðoyingum og gestum øllum at verða hjartaliga vælkomnum til Klaksvíkar, at njóta okkara gestablídni og alt, sum skráin hevur at bjóða.

**Vælkomin á Norðoyastevnu 2004!**

# Klaksvík er Norðoya móðir

**Tá flaggdagur er farin, síggjast kappróðrarbátar aftur á firðum og sundum. Kappróðurin er sum tjaldrið, hann boðar frá ljósari tíðum, summari og lýkku.**



Og soleiðis er Norðoyastevnan eisini ein marknasteinur. Sum fyrsta summarstevnan letur hon upp summargluggan, og skjøtil verður settur á tær ítróttarkappingar, ið hoyra summarinum til — fyrst og fremst kappróðurin.

»Her er stuttligt á Norðoyastevnu, tá ið ungfólkið møtist til leik, har at royna sær kynstur og evni, her, hvar blíðskapurin aldri sveik …«

Soleiðis yrkir Bernhard Brim í »tjóðsangi« klaksvíkinga, »Tað er vakurt í Klaksvík«, har hann so hugtakandi lýsir býin í summarbúna: »Tá ið sólin hon kyssir hvørt strá, og ei skýkloddi hómast á himli, og eitt fleyr sæst á speglblonku vág.«

Hóast Norðoyastevnan er um vikuskiftið, so verður tjóvstartað longu í dag. Hetta er vorðin siður á summarstevnunum, at tær verða toygdar yvir fleiri dagar. Og soleiðis má tað helst verða, tí at tiltøkini at fara til gerast fleiri og fleiri — og hátíðardámurin harvið longri.

Bernhard Brim yrkir víðari um Klaksvík, at hon er ein »… tryggjandi staður, fyri skipum, ið søkja sær havn, og tí smíilist hvør sjómaður glaður, tá ið Klaksvíkin er fyri stavn«.

Klaksvíkin er ein góð havn, og klaksvíkingar kunnu vera ernir av sínum fiskiflota og fiskivinnu, men valla hevði Bernhard Brim ímyndað sær, at fólk um stutta tíð kunnu koma líka úr Gásadali at halda Norðoyastevnu — uttan at fara í bát og uttan at fara um fjall! Men soleiðis verða vit øll knýtt tættari hvør ørðum, og tað hevur sjálvsagt sínar fyrimunir.

Men klakvsíkingar fara at megna at varðveita Norðoyastevnuna sum ta fólka-, mentanar- og ítróttarhátíð, sum hendastevna, ið setir skjøtul á summarstevnunar, er.

»Tí at Klaksvík er Norðoya móðir, hon er norðoyinga álit og trygd, hon er menning og nørandi gróður, her í Norðoya prúðastu bygd«, yrkir Bernhard Brim eisini.

Góða Norðoyastevnu og gott summar ynskja vit á Sosialinum við hesum serliga Norðoyastevnublaðnum!

**Eirikur Lindenskov, blaðstjóri**



